Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend




**P/F Svend Krosstein** er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 20 fólk í fulltíðarstarvi. P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta HVS-handilin í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveitingar, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.

## Lærlingur søkist

**Kundi tú hugsað tær eina framtíð innan handilsyrkið?**

Vit hava pláss fyri einum lærlingi (m/k) í fyritøku okkara.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu í støðugari menning
- Eitt starv, har tú gerst partur av einum góðum toymi, har arbeiðsandin er av teim bestu og fokus verður sett á trivnaðin hjá tí einstaka starvsfólkinum
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.

Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár.

Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jógvan Magnussen, handilsleiðara ella Anniku Krosstein, stjóra. Umsóknarfreistin er 1. mars 2008.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum til:

**P/F Svend Krosstein**
**Postboks 3229**
**FO-110 Tórshavn**
**Viðm: Lærupláss**

Svend Krosstein P/F
Falkavegur 6 · FO-100 Tórshavn · Tel. 34 46 00
Fax. 34 46 01 · T-post: krosstein@krosstein.fo

# Fleiri nýggj frímerki




Í dag, mánadagin 11. februar, gevur Postverk Føroya út fleiri nýggj frímerki undir heitunum: Sagnarheimar Elinborg Lützens, Tuberklastøðin 100 ár, Klaksvík 100 ár og Tinganes.

Sagnarheimar Elinborg Lützens er eitt smáverk við seks frímerkjum, ið avmynda linoleumsskurðir sum Elinborg hevur gjørt. Seks ymisk frímerki eru í arkinum, sum hava virði av 10 krónum hvørt.

Tuberklastøðin í Hoydølum verður 100 ár í 2008. Í hesum sambandi verða tvey frímerki givin út. Á øðrum frímerkinum er mynd av teimum fyrstu sjúklingunum í Hoydølum og einum parti av bygninginum. Hetta frímerki hevur eitt virði av kr. 5,50. Á hinum frímerkinum er mynd av Dr. Magnussen í ferð við at kanna ein ungan mann fyri tuberklar og ein mynd av einum smádrongi, sum ímyndar koppseting av frískum børnum og vaksnum. Hetta frímerki hevur virði av kr. 9.00.

Klakvíkar kommuna verður eisini 100 ár í 2008. Hetta verður hátíðarhildið við eini frímerkjaúggávu. Myndin, sum avmyndar Klaksvík sum fiskivinnubý, hevur Edward Fuglø teknað. Hetta frímerki hevur virði av kr. 5,50.

Eitt frímerki er av gomlu bygningunum úti í Tinganesi. Hetta frímerkið hevur virði av kr. 14,00

mg

HAV LÆGSTA BOÐ OG VINN!

SMS KAPPING – VINN FAMILJUFERÐ TIL DANLAND Í BLOKHUS

Kappingin byrjar í dag 11. februar og heldur fram til og við 22. februar 2008



SMS'a títt boð og vinn eina ferð við Smyril Lini fyri eina familju til Danland í Blokhus á páskum.
Tann, ið SMS'ar lægsta boðið og er einsamallur við tí boðnum, vinnur vinningin. Hava fleiri boðið tað sama, fella hesi boðini burtur.

**Dømi:**
Per SMS'ar 100 kr.
Hans SMS'ar 100 kr.
Ann SMS'ar 125 kr.
Petur SMS'ar 150 kr.

Per og Hans fella burtur. Ann hevur nú lægsta boð og hevur vunnið. Petur fellur burtur, tí Ann hevur lægri boð og er einsamøll.

Var Petur eisini komin við einum boði upp á 125 kr., fullu boðini hjá Ann og Petur burtur og fremsta boðið var t.d. Kári, sum SMS'aði 127 kr. einsamallur.

**Soleiðis luttekur tú**
SMS'a á 1991 og skriva »SOS bod« frammanfyri títt boð, t.d. »SOS bod 133«

**Kostnaður**
Kostnaðurin fyri at vera við í spælinum er 5 kr. pr. SMS. Vinnarin rindar 5 kr. + boðið, t.v.s. um viðkomandi bjóðar 133 kr., er kostnaðurin 133 kr. + 5 kr. = 138 kr.

**Kostnaður um tú ikki vinnur**
Vinnur tú ikki, er kostnaðurin bert 5 kr.

Kappingin byrjar mánadagin 4. februar og heldur fram í 10 dagar, til 15. februar.

**Vinnarin verður kunngjørdur í Sosialinum í viku 8.**







Sosialurin

Smyril Line